# Kjak



**Bergun Kass**
*Bergun.kass@gmail.com*

# Hvussu, og undir hvørjum umstøðum ynskir kvinnan at hava ávirkan!

*Hví so fáar kvinnur? – Kappingarinstinktið - maður sær mann – lønarskalar – og arbeiðsumstøður. Fari her at hugleiða eitt sindur øðrvísi og vísa á nakrar dagligar myndir, sum vísa munir millum mann og kvinnu sum heild, og sum kann vera munurin í kapprenningini um ábyrgdaruppgávur.*

Fari at skriva eitt sindur hvørt um annað – viðvíkjadi politikk-, stjóra- og leiðarauppgávu.

Havi hug til at hugleiða og seta fokus á 'biologiskar faktorar', sum kunnu vera ein av orsøkunum, og geva uppskot um nýhugsan í arbeiðshátti og –tilrættaleggjan .

Hugsa vit um kappingar yvirhøvur – (veit, at tað ikki altíð kann generaliserast, tá tosað verður um mann og kvinnu, men sum gjøgnumgangandi)

### Ítróttarmyndin!

Maður vil vinna – í leiki, í ítrótti – óansæð støði. T.v.s. um menn íðka motiónsítrótt í spølni, so 'geva teir alt tað teir eiga' – tað 'gjeldur' um at vinna. Kvinnur tíma ikki eingang at telja, hjá teimum er tað mest motiónin og samveran sum er týðandi.

Og tí vil eg her draga parallellir við t.d. eina løgtingslim tilgongd.

Er tað sporturin, spenningurin, dysturin, sigursrúsurin, statusið, samsýningin, sum er incitamentið og sum eggjar manninum til politiska leiklutin ella er tað hjartasakin, eldsálin og tað at gera mun í samfelagnum. Eg loyvi mær at ivast – tí vit hoyra so ofta um 'breyðpolitikkarar', t.v.s. tá málið líkasum er horvið og 'man situr og trekkir løn sum tað einasta'.

Hoyrdi eisini fyri kortum Magna Laksáfoss siga, at tingarbeiðið var so ørkymlandi, tí tað vísti seg ofta sum málið var at finna semjur og koma víðari. Útfallið av semjuni kom í aðru rekkju, og vigaði ikki so tungt hjá tí einstaka liminum.

Hetta kann vera ein faktorur sum ávirkar, í hvønn mun kvinnur eru við – at kvinnan ikki reiðuliga kemur í kappingarrúsin ella við í kapprenningina – tí tað í sjálvum sær ikki er málið.

Harafturímóti síggja vit leiklutin hjá kvinnuni sum stríðandi fyri tí smáa og heimliga.

Man tað í flestu førum ikki vera kvinnan, ið tekur samband við barnagarð ella skúla, tá ið barnið ikki trívist? Og hvussu er javnstøðan í foreldrabólkunum ? – Í skúlaflokkinum hjá dóttur okkara eru tað 6 kvinnur, ið umboða foreldrini. Hví eru menninir ikki her? Hvør fer upp á barrikadurnar og tosar sakina hjá teim gomlu? Hvør tosar um børn við serligum tørvi? og soleiðis allan veg in ígjøgnum – Vit síggja kvinnurnar her og nú, tá mál av hesum slagi stinga seg upp – sum beinleiðis ávirka lívsdygdina hjá tí einstaka menniskjanum.

### Kantinumyndin!

Fara vit inn í kantinurnar á størri arbeiðsplássum, so síggja vit eina mynd, sum vísir nattúrligar samansettar samskiftis- og samveruhættir. Tað er ikki álagt fólki hvar og hvussu tey skulu sita í kantinuni.

Í flestu førum finnur mann borð við monnum og borð við kvinnum. T.v.s. at kvinnu dámar best at práta við kvinnu og maður prátar við mann. Víðari kann eg siga, at menn tosa um ítrótt (kanska eitt sindur politikk) og kvinnur tosa um familju, børn og hvat tær hava sæð í sjónvarpi – øgiliga stutt og groft uppsett, men soleiðis haldi eg at myndin er gjøgnumgangandi.

Hetta vil so aftur siga, at tá ið menn í flestu føru hava leiðaramaktina, so vil leiðaravegurin og tað arbeiðssamskiftið víðari eisini nattúrliga fella á mannin og av hesum úttrykkið "menn síggja menn".

Síðani kemur hin síðan av sakini – at dugnaligar kvinnur sum leiðarar eisini nattúrliga halda seg burtur.

Hava tær hug til tætta samskiftið við mannfólkahópin – og í flestu førum arbeiða eftir hugburði, reglum og virðum, sum tær møguliga ikki sjálvar kunnu taka undir við ella standa inni fyri? Í øllum føri blívur hetta samskiftið og hesin leiklut-urin saman við monnunum ofta ørkymlandi og slítandi fyri kvinnuna.

### Lønarskalar

Eitt annað – sum er áhugavert og kundi bøtt um skeivfordeilinga ella kvinnuliga undirmanninga í leiðsluhøpi eru lønarskalar/samsýningar og samansetingin ov jobprofilum.

Ovastu trinini á karrierustiganum eru leiðari og stjóri. Og fyri at koma aftur til kappingarandan og mannliga incitamentið, so eru tað ofta menn, sum antin eru við í kapprenningini á hesum støði ella verða headhuntaðir av monnum.

Henda leiðarauppgáva krevur bæði fakligt dugnasemi, men eisini evni at leiða – t.v.s. at inspirera, involvera og informera, fyri at motivera starvsfólkini.

Sjálvdan hevur leiðarin báðar hesar eginleikarnar og tí skuldi ein jobprofilur, lønarskali og toppskali verði fyri fakligt dugnasemi eins og fyri fólkaleiðsludugnasemi – T.v.s. at 2 fólk mynda uppgávuna, ella man finnur leiðslubygnaðir, har bæði viðurskiftini hava líka høga raðfesting. Hetta hevði gjørt, at tað vóru færri 'skeivir leiðarar' sæð við starvsfólkaeygum, og færri feilsetanir, har 'skeivi leiðarin' setir skeiv fólk undir sær, orsaka av manglandi innliti í starvsfólkaviðurskifti.

Rokni við at kvinnurnar her meira høvdu kunna gjørt seg galdandi, og fingið ávirkan sum starvsfólkaleiðarar á stjóra- og deildarstøði og væntandi ávirkað arbeiðsumstøður og –umhvørvi eisini til fyrimunar fyri kvinnuna Hesin leiðslutankin er óivað eisini orsøkin til, at mann ídag í professionellum fyritøkum í Danmark og aðrastaðni setir ein HR ovasta (Human Ressource) í ovastu leiðslu, tí man sær týdningin í málrættaðari starvsfólkaleiðslu á hægsta stigi. Her til eru vit ikki komin í Føroyum.

Her verða leiðarar ofta settir við fakligum eginleikum, fyri síðani aftaná at byrja at útbúgva seg sum starvsfólkaleiðari. Tað er, eftir mínum tykki, ov seint – eginleikin má vera har frá degi 1, tí ella verða ov nógvir leiðslufeilir gjørdir ta fyrstu tíðina, orsaka av manglandi fólkaleiðsluinnliti – og seinni finnur viðkomandi møguliga útav – at tað at hava við starvsfólk at gera, var ikki tað hann brendi fyri. So virðing fyri, at tað fakliga og tað starvsfólkaleiðsluliga eru hvør sítt slag av leiðarauppgávu og báðar uppgávurnar mugu hava eins stóra raðfesting beinanvegin!

### Arbeiðsumstøður!

Og tí komi eg nú til arbeiðsumstøðurnar sum lyklaorðið – fyra at økja um kvinnuliga ávirkanarleiklutin í samfelagnum.

Tað verður so ofta tosað um, at um kvinnan skal fram, so skal hon arbeiða nógv meira enn vanligt – hví tað? Skulu tankar, vitan, hugskot, sparring, engagement o.l inn í ávísan dagligan tíðarkarm?

Tøkniliga framgongdin hevur fleiri alternativ til samskifti - har kvinnan kann vera fleiri staðir ísenn.

Í nýggja vitanarsamfelagnum er tíðarfaktorurin - tímar á einum arbeiðsstólisum avgerandi fyri 'output og dygd sekunderur'. Her er tað vitan og fjølbroytni sum setur dagsskrá, og tað sum fólk einstaksvís kunnu 'bidraga' við.-

Tað verður tosað um at skipa tingini betur, so pápin er meira virkin á heimafrontinum og mamman kann verða meira burturi heimanífrá – nei! Mamman vil eisini mussa og klemma barnið áðrenn tað fer til songar! Tú kanst ikki bara organisera teg burtur frá sakni og kenslum. Øll ting skulu passa saman. Tað er ikki neyðugt at geva avkall uppá familjuna, um tú skalt hava eina arbeiðskarrieru við ávirkan.

Og tað er hetta slagi av broytingum ið skulu til – um kvinnan veruliga ynskir at vera við og hava ávirkan, tí nú umboðar arbeiðslívið og arbeiðstilboðið eisini kvinnuna og kvinnuverðina, - fakið, arbeiðsfjølbroytni, vísdóm, bleytu virðini v.m.

## *Javnstøðuarbeiðið og kjakið í almenna rúminum skuldi verið minni aggressivt frá kvinnunum – mótvegis monnunum*

Vit fáa ikki broytt arbeiðsumstøðurnar fyrr enn vit eru fleiri kvinnur í felag, sum arbeiða saman við monnunum, soleiðis at arbeiðsumstøðurnar verða fyri bæði kynini. Sum minnilutar koma vit 'bara til kort og slíta okkum upp'.

So mítt ynski er, at arbeiðsfokus um javnstøðu framyvir verður:

- At læra kvinnur kapprenningina
- At fáa HR og bleyt virði at hava hægri raðfesting á arbeiðsplássum- ikki bara sum eitt eiti- men professionelt.
- At betra um arbeiðsumhvørvi, so uppgávan talar til kvinnuna

(her kundu fakfeløgini eisini hjálpt til og flutt fokus – frá samsýningum til -lívsdygd og arbeiðsumhvørvi fyri bæði kynini).

Haldi sjálv at javnstøðuarbeiðið og kjakið í almenna rúminum skuldi verið minni aggressivt frá kvinnunum – mótvegis monnunum.

Haldi tað hevði verið betri og meira konstruktivt við sakligheit, grundgevingum og góðum samstarvsanda.